# Visiónin frá 80'unum

HEÐIN
SAMUELSEN

Ein av stóru syndarunum til fíggjarskrædlið í 1980-unum, fyrrv. Føroya løgmaður Pauli Ellefsen – sum síðani einaferð í síðstu øld hevur krógvað seg fyri almenninginum - roynir í grein í Sosialinum um visión 2015, at snúgva sær undan medábyrgd.

Hann lessar alla ábyrgd yvir á fíggjarmálaráðharran, sum sat í samgonguni eftir hansara egnu frá 1980-84. Óivað stavar nógv av skuldini frá samgonguni 84-88. Men eisini var fíggjarmálaráðharrin so óumhugsin at grava fram alla gamla skuld, sum ábyrgdaleys landsstýri høvdu hongt um hálsin á føroyingum. Heldur enn at farið í hvønn krók og drigið óskrásetta skuld fram, átti hon kanska at havt gjørt sum Pauli sjálvur, meðan hann sat sum løgmaður: Feia inn undir gólvteppið og so latið tey, sum komu aftaná eiga upptakið.

Her var fíggjarmálaráðharrin ikki nóg snildur og kom tí eisini at taka ábyrgd av skuld, sum Pauli Ellefsen átti.

Men hann heldur kanska, at føroyingar eru so stuttmintir, at teir hava gloymt - bert fyri at nevna okkurt av hansara nógvu brøgdum - tey 12-15 farmaskipini hann bjóðaði smáinvestorum við bæði landkassastuðli og -veðhaldi, og sum hesir og landskassin bløddu fyri í nógv harrans ár. Tað var fyrst og fremst løgmaður Pauli Ellefsen og hansara landsstýri, sum í tíðarskeiðnum 1980 – 1984 sleptu landskassaveðhaldini til skip á "glíðibreytina", og sum at enda eisini vóru ein stór orsøk til, at alt samfelagið kollsilgdi í 1992.

Tá Pauli nevnir, at blokkstuðulin fór upp í royk í 80'unum, hevur hann púra rætt. Danski blokkstuðulin fór snøgt sagt allur sum hann var, undir heitinum "stuðul til fiskivinnuna" upp ígjøgnum skorsteinin á einum alt ov stórum og órationellum fiskiflota. Og hevði tí lítlan og ongan positivan týdning í búskapinum.

Síðani fer hann eftir fullveldislandsstýrinum og tvíheldur um, at føroyingar ikki tóku undir við hesum.

Jú somikið stór varð undirtøkan millum føroyingar fyri fullveldinum, Pauli Ellefsen, at sjálvt 100 ára gamli Sambandsflokkurin fyri at hava lív lagað, føldi seg kroystan til at smoyggja illavornað orðið "sjálvstýrið" í stevnuskrá sína. Og gudhálpi mær um teir ikki eru við, nú kirkjan verður yvirtikin á ólavsøku. Og takk skulu teir hava fyri tað.

# Jacta est alea

EYÐUN MOHR
VIDERØ



Nú er framtíðar politiska avgerðin tikin hjá Karsten Hansen. Hann kann ikki longur virka í tí "ókristiliga" Tjóðveldisflokkinum.

Tað er sera áhugavert at fylgja eini sovorðnari avgerð og gera sær sína egnu meting um samlaðu hendingina.

Karsten er "føddur" inn í Tjóðveldisflokkin. Pápi hansara var virkin í politikki og fakfelagsarbeiði, so at Karsten endaði í sama flokki er heilt náttúrligt. Í sovorðnum føri snýr tað seg ikki um at vera samdum í øllum, tí alla tíðina verða broytingar gjørdar í uppfataníni av politiskum hugsjónum og normum, men ein meðvitandi persónur setur sær heldur fyri at vera virkin og vera við til at laga flokkin og stevnuskrá til tíðina, men kortini altíð halda endamálið í eygsjón.

Tveir hugsjónarliga veikir populistar í Tjóðveldisflokkinum settu sær sum mál at vinna eyka atkvøður til komandi løgtingsval við at egna fyri sokallaðum homoseksuellum. Hesi settu okkara "høga" løgting í "sjokkstøðu" við uppskotinum um broytingar í revsilógini grein 266b. Henda viðgerð er ikki verd meiri umrøðu!

Karsten hevði so stórar trupulleikar av støðu flokksins í hesum máli, at hann helt seg ikki kunna virka har longur, og hann bað tí um at verða strikaður bæði úr tingbólki og valfelag!

Í morgun hava vit frætt í fjølmiðlunum, at hann hevur gjørt av at melda seg inn í Miðflokkin, ivaleyst tí, at har heldur hann seg kunna virka við sínum andaligu sannføring og politiska tevi.

Men er tað hetta, ið eg og onnur vænta okkum av einum "sinniligum politiskum tungvektara"? Nei!

**Er tað ikki júst teimum sjúku, ið tørva lækna?**
Var avgerðin hjá tjóðveldistingmonnum so skeiv, so hava teir júst tørv fyri einum andaligum vaknum persóni til rættleiðingar, men kortini rýmdi hann av garði! Hví?

Vit enda tíverri eisini hesaferð í somu skuffu, sum so mangan áður, at sjálvt eitt so "høgt" starv sum løgtingsmaður endar sum eitt lívsstarv hjá einum breyðpolitikkara!

Tikið verður mangan til orðini: Andin er fúsur, men holdið er veikt. Men í hesum føri meti eg, at styrkin í holdinum er fúsur, men andin er veikur!

# Krevji eina átalu

JÓGVAN VIÐ
KELDU
Limur í
Norðurlandaráðnum



Harra Jóannes Ejdesgaard,
løgmaður,
Tinganes
110 Tórshavn

Eg fari sum limur í Norðurlandaráðnum, umboðandi samgonguna at heita á løgmann um at koma við eini átalu og at bera so í bandi, at ein rættleiðing verður givin í sambandi við 12. resolutiónina í "Slutdokument – Ungdomens Nordiska Råd 27.-29.10. 2006 Christiansborg , København", sum er viðløgd brævinum.

Her verður m. a. sagt, at:
"En nedstemming av lovforslag om diskriminationsbeskyttelse for homoseksuelle på Færøerne har ført til vold mod homoseksuelle og omfattende forfølgelse af homoseksuelle".

Løgmaður er greiður yvir, at hetta er bæði ósatt og óheppið og setur føroyska hampamannin í eitt sera vánaligt ljós.

Eisini leggi eg dent á, at vit í Føroyum hava skrivifrælsi, sum er meiri vert, enn vit mangan geva okkum far um, og sum í ríkiligt mát hevur verið brúkt seinastu tíðina, har lesarabrævskrivarar hava givið til kennar sínar ymiskligu meiningar.

Hinvegin skulu vit minnast til, at her er ikki talan um lesarabrøv, men ein niðurstøða, sum 55 umboð fyri norðurlendska komandi politiska ættarliðið hevur sett út í kortið.

Á fundi millum Mentanarnevnd Norðurlandaráðsins, har eg umboðið Føroyar og á hini síðuni umboð Ungdóms-Norðurlandaráðsins havi eg átalað viðferðina okkara komandi ættarlið av politikarum gevur føroyska hampamanninum.

Eg fari tí at heita á teg um vinarligast at taka málið upp, geva eina átalu fyri hesa viðferð og krevja eina rættleiðing og umbering.

# Føroyska umdømið í útlondum má verjast

*Tíðindaskriv frá Fólkaflokkinum*

**Fólkaflokkurin undrast á, hví onki hoyrist frá løgmanni og Høgna Hoydal í samband við ósonnu og niðurgerandi niðurstøðu hjá Ungdóms-Norðurlandaráðnum móti føroysku tjóðini**.

Jógvan við Keldu, limur í Norðurlandaráðnum hevur á fundi hvassliga mótmælt ósonnu og óhepnu niðurstøðuni hjá Ungdóms-Norðurlandaráðnum, har føroyska tjóðin víðfevnt verður løgd undir at søkja at og forfylgja samkyndum.

Á viðtøkuskjali "Slutdokument - Ungdomens Nordiska Råd 27.-29.10.2006, Christiansborg, København" vóru 13 niðurstøður festar á blað. Í 12. resolutiónini stendur soleiðis m.a.:

**"En nedstemming av lovforslag om diskriminationsbeskyttelse for homoseksulelle på Færøerne har ført til vold mod homoseksuelle og omfattende forfølgelse af homoseksuelle".**

Í seinastu viku var fundur millum Mentanarnevndina hjá Norðurlandaráðnum, har Jógvan við Keldu situr, og hinumegin umboði fyri Ungdóms-Norðurlandaráðsins, har Føroyar eisini eru umboðaðar. Á hesum fundi var greitt frá arbeiðinum hjá Ungdóms-Norðurlandaráðnum, sum vanligt er, og síðani hava politikarar høvið til at spyrja og geva viðmerkingar.

Jógvan førdi fram yvirfyri umboði Ungdómsráðsins, at hann undir ongum umstøðum kundi góðtaka viðferðina føroyska tjóðin víðfevnt fekk frá ráðnum og vísti á, at hetta var bæði óheppið og ósatt, at leggja føroysku tjóðina undir at útinna "vold mod homoseksuelle og omfattende forfølgelse af homoseksuelle".

Fólkaflokkurin er samdur um, at hetta setur eisini føroyska fólkið í eina óveruliga støðu, og vanligi føroyski hampamaðurin verður av órættum settur í eitt serliga vánaligt ljós.

Svarið frá formanninum í Mentanarnevndini var, at "vit kunnu ikki blanda okkum upp í teirra avgerðir".

Svarið frá umboðið Ungdóms-Norðurlandaráðsins var, at "tað er harmiligt, at føroyska umboðið skuldi taka tað soleiðis".

Tí hevur Fólkaflokkurin viðgjørt málið og sjálvandi virðir flokkurin skrivifrælsið og vísir í hesum høpið á, at lesarabræv-skrivarar í ríkiligt mát hava nýtt hetta frælsið, men átalar, at 55 politisk umboð, sum er partur av komandi politiska ættarliðinum í Norðurlondum gevur føroyska fólkinum tílíka viðferð, eigur ikki at vera góðtikið og eigur at verða mótmælt frá hægsta staði.

Tað undrar eisini, at løgmaður og hansara fjølmiðlalið ikki hevur gjørt vart við hetta fyrr. Eisini má sigast, at Høgni Hoydal, sum er danskur varamaður í Norðurlanda-ráðnum, Tjóðveldisflokkurin og fyri alt tað Norðuratlantsbólkurin, sum bara tað "lotar av hanakjafti" ger viðmerkingar og hevur spurningar, tá nakað er áfatt, ikki hevur latið við seg komið.

Jógvan við Keldu, sum er annar føroyski limurin í Norðurlandaráðnum og umboðar samgonguna, hevur tí sent løgmanni bræv, har hann heitir á hann at fáa hetta avsannað.

# Konfliktpunktið hjá Landsverki

KRISTIAN
STÓRHAMAR
Trongisvágur

I eini tíðindasending í ÚF herfyri úttalaði landsverkfrøðingurin seg um verkætlanina "Skálafjarðartunnulin", har hann segði seg ikki kunna viðmæla at rundkoyring verður gjørd, "*tí tað ikki er heppið at hava konfliktpunkt, har møguleiki er at rena á hvønn annan, harumframt er vandi fyri, at man skapar køir, tá mest ferðsla er*" og at hettar er í móti teimum normum ið landsverk arbeiðir eftir.

Tað, ið landsverkfrøðingurin førir fram, er ein fullkomin andsøgn, við tað sum landsverk hevur praktiserað á ferjuleguni á Krambatanga á Trongisvágsfirði.

Her hevur landsverk tilrættalagt verulig "konflikt punkt", við tað at ferðafólk skulu tvørtur um koyribreytina fyri at koma til bussar og bilar. Ásannandi tað at bilar og fólk koma við somu ferju og koma samstundis í land, fær man køir, ið gera dupulta portrið á Smyrli meinigsleyst. Man kann undrast á, at tað er sami landsstýrismaður, ið hevði ábyrgdina av bæði bílegging av Smyrli og byggjan av ferjuleguni.

Hesin vandin á ferjuleguni hevur verið umrøddur í bløðunum fyrr, har víst hevur verið á, at vegurin sjálvsagt skuldi gingið undir bakkanum heilt út á endan á ferjuleguni!

Fyri at hjálpa um trygdina hevur landsverk gjørt bungur á koyribreytina, umframt at seta eina rúgvu av prestum upp, so ferjulegan nú mest líkist einum pinnsvíni.

Hvussu ber tað til, at ein so tápulig strukturering, ið hvørki er praktisk ella trygdarliga forsvarlig av eini ferjulegu, ikki verður steðga á skrivaraborinum?

Hví verður vegurin ikki fluttur niðan undir bakkan?

Hvar er Ferðslutrygd er hesum málið, hví vísa teir ikki á vandan, tá landsverk ikki sær hann? Bíða teir eisini eftir, at ein ólukka skal henda fyrst?